**Dagur:** 2. februar 2011
**Máltal:**

*Lærugreinakunngerð* — **Handilsskúlin** — *Februar 2011*

# Støddfrøði C

*Endamálið*

**1.** Endamálið við undirvísingini er, at næmingurin
a) ognar sær vitan og innlit í støddfrøði og støddfrøðiligan málburð
b) ognar sær fimi og hættir at loysa spurningar, soleiðis at støddfrøðin kann vera honum til hjálpar í øðrum lærugreinum og framhaldandi útbúgving.

*Undirvísingin*

**2.1** Í undirvísingini arbeiðir næmingurin víðari við tí grundarlagi, hann hevur, bæði ástøðiliga og verkliga. Undirvísingin skal menna rokniførleikan og framhaldandi økja kunnleikan til støddfrøðina sum eitt amboð, ið kann orða, greina sundur og loysa týðandi spurningar.
**2.2** Skrivligt arbeiði er partur av undirvísingini. Einstaki næmingurin letur regluliga inn 25 uppgávurøð, sum lærarin rættar og ger viðmerkingar til. Hvørt raðið skal í arbeiðsbyrðu svara til 50-100% av einum próvtøkuraði. Skrivligu uppgávurnar kunnu vera smáar venjingaruppgávur ella meiri samansettar uppgávur.
**2.3** KT er partur av undirvísingini og skal stuðla uppundir høvuðsevnini í lærugreinini.

*Innihaldið í undirvísingini*

**3.1** Undirvísingin fevnir um 6 høvuðsevni:
*1. Tøl*
Heil tøl, brot og reel tøl. Roknireglur. Talmongdir. Rokning við potensum og rótum. At loysa einfaldar líkningar, ólíkningar og dupultar ólíkningar.
*2. Prosent- og renturokning*
Prosentrokning, miðal prosenttal, vigað miðal, vísutøl og prístal. Renturokning. Javngjaldsrokning: samansparing og lán.
*3. Funkur*
Funkuhugtakið: krossskipan, frummongd, virðismongd, forteknsskifti, grafur og monotoniviðurskifti. Grundleggjandi funkur: polynom á 1. og 2. stigi, linjubrotnar og eksponentiellar funkur. Einkultlogaritmisk krossskipan og grafisk funkukanning.
*4. Líkindarokning*
Stokastisk roynd og líkindi. Líkindaøki og javnbýtt líkindaøki.. Hendingar. Stokastiskur variabul, kombinatiónir og binomialbýti.
*5. Hagtøl*
Óflokkað hagtøl, miðal, mesti, miðjan, pinnamynd og trappumynd. Flokkað hagtøl, stabbamynd, sumkurva og fraktilar. Normalbýtið og leysligt normalbýti.
*5. Fíggjar- og íløgurokning*
Fram- og afturrokning av kapitalvirði, útrokning av rentufóti og terminstali. Javngjaldsrokning, bæði sum spari- og lánijavngjald. Útrokning av terminsgjaldi, terminstali, og kanning av rentufóti.. Seriulán. Fíggjarskipanir, eitt nú á partabrævamarknaðinum.

*6. Valfrítt evni*
Umleið 15 tímar verður undirvíst í valfríum evni eftir hugi og tørvi og við atliti at tvørfakligari undirvísing. Næmingarnir fáa her høvi til djúpari viðgerð av verandi evnum ella arbeiði við nýggjum evnum.

**3.2** Lisnar verða tilsamans einar 160-260 síður, treytað av valda undirvísingartilfarinum.

*Próvtøkan*

**4.** Hildin verður ein munnlig og ein skrivlig próvtøka.

**5.1** Til munnligu próvtøkuna er fyrireikingartíðin umleið 20 minuttir, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**5.2** Næmingar, ið fara til próvtøku, geva upp umleið helvtina av lesipensum. Treytað av valda tilfarinum verða givnar upp einar 80 - 140 síður, valdar soleiðis, at býtið á tey 6 høvuðsevnini er nøkulunda javnt.

**5.3** Fyri sjálvlesandi er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**5.4** Í fyrireikingartíðini eru hesir hjálparmiðlar loyvdir: læribøkur og annað tilfar við tilknýti til lesipensum, heruppií egnar uppskriftir og roknitekniskir hjálparmiðlar.

**5.5** Hvør próvtakari fær ein spurning. Spurningurin verður orðaður soleiðis, at tað verður møguligt at eftirmeta bæði evni próvtakarans sjálvstøðugt at leggja fram part av einum serstakum evni og yvirlit próvtakarans yvir eitt fakligt øki. Undir próvhoyringini skal próvtakarin bæði hava høvi at leggja fram ein avmarkaðan part av spurninginum og at taka lut í samtalu við próvhoyraran. Herundir til dømis at gera viðmerkingar til fylgiskjøl ella loysa uppgávur.

**5.6** Fyri munnliga avrikið verður givið 1 próvtal við støði í einari heildarmeting.

**6.1** Skrivliga próvtøkan varir 4 tímar. Roknað verður eitt uppgávurað. Nakrar uppgávur eru valuppgávur. Í raðnum stendur, hvussu nógvar valuppgávur loyvt er at lata inn til dømingar. Verða ov nógvar valuppgávur latnar inn, verður í dømingini sæð burtur frá tí ella teimum valuppgávunum, sum standa síðst í svarinum. Uppgávurnar verða settar innan høvuðsevnini.

**6.2** Til skrivligu próvtøkuna eru hesir hjálparmiðlar loyvdir:
a) Støddfrøði, formlasavn C, Føroya Skúlabókagrunnur 1995 ella seinni, ella annað góðkent formlasavn
b) Góðkendan lummaroknara
c) Rentu- og hagtalstalvur
d) Serpappír: millimeturpappír, einkultlogaritmiskt pappír við 3 tíggjundum á uppásini og normalbýtispappír

**6.3** Tá ið uppgávurnar verða dømdar, verður dentur lagdur á, at hugsanarháttur próvtakarans týðiliga sæst í svarinum, at rætt er roknað, og at skilagóð háttaløg eru nýtt.

**6.4** Fyri skrivliga avrikið verður givið 1 próvtal við støði í einari heildarmeting.